# Martha Matras 98 ár

Tað má sigast, at tey eldast væl á ellisheiminum í Havn. Í august vóru ein 101 og ein 100 ára føðingardagur, og 21.oktober verður Martha Matras 98 ár. Tískil eru hesar tríggjar avrundað 100 ár í miðal.

Hetta er ein kempualdur, sum bert tey fæstu náa, og tí er eisini orsøk til at gera nakað burturúr. Sjálvur havi eg kent Marthu nøkur ár. Okkara kennskapur byrjaði við, at FF-blaðið gjørdi eina samrøðu við systir Marthu, Onnu Askham. Anna var tá 102 ára gomul. Hon búði á Ellisheiminum, og tað vísti seg, at hon átti eina ”lítlasystir” á heiminum. Tað kom skjótt til sjóndar, at Martha eisini var framúr skilagóð og hevði eitt stak gott minni. Hon kundi greiða frá viðurskiftum, sum Anna kanska ikki kendi so væl. Tískil kom Martha eisini at eiga sín part í teirri sera forvitnisligu frásøgn, sum kom burtur úr, um hvussu tað var at vera barn og ungur í Havn fyri nærum 100 árum síðani, beint eftir at Petur Alberg skrivaði sína dagbók, sum Miðvikan er við at endurprenta. Sigast kann, at søgan hjá Onnu eisini fyri ein stóran part var søgan hjá Marthu.



Anna doyði fyri tveimum árum síðani, 104 ára gomul. Men eg komi framvegis javnan inn á gólvið á Ellisheiminum, har tað búgva so nógv skilafólk. Tá verður høvið eisini nýtt at heilsa uppá Marthu og at kunna fáa eitt prát við hana.

### Foreldrini úr Lorvík og Kollafirði

Pápi Marthu var Jákup Christian Mørkøre, sum var ættaður úr Lorvík. Mamma Onnu var Johanna Sofía f. Niclassen, sum var ættað úr Kollafirði. Tey bæði giftust so í 1896, og tey búsettust í C. Pløyensgøtu. Hetta er beint við tað gamla dómhúsið, so tey hava búð mitt í Havn. Tey bæði fingu 9 børn, seks gentur og tríggjar dreingir, har Martha var tað sætta í røðini. Her kann verða nevnt, at øll børnini búsettust í Havn, og tað var allar dagar gott samanhald teirra millum. Tey gingu fast túr og skiftust so um at fara inn hjá hvørjum øðrum.

### Martha javngomul við sjálvstýrisflokkin

Martha verður so fødd 21. oktober 1909. Hvussu langt síðan hetta er kann fáast ein ímynd av við at hugsa um, at hetta er árið Sjálvstýrisflokkurin verður formelt skipaður, at reiðarafelagið verður stovnað, at føroysk skip fara regluliga at fiska á suðurlandinum í Íslandi, at Jákup Dahl søkir um at sleppa at halda seinnapartsgudstænastu á føroyskum, at háskúlin flytur til Havnar, og at fyrsta føroyska skaldsøga Bábelstornið verður prentað sum framhaldssøga í Tingakrossi.

Martha hevur tí upplivað stórt sæð allar broytingar í landinum og ikki minst í Havn. Her er nógv broytt, síðan hon saman við vinkonuni Nellu (Dahl), plagdi at fara við neytunum niðan eftir Landavegnum!

Martha minnist 1.veraldarbardaga. Millum annað minnist hon skamtunarkortini, og greytin tey fingu, og sum minti um sagarspønur. Saftin tey fingu var rabarbusaft. Hon var jú føroysk framleiðsla og útlendsk saft fekst ikki.

Sum ung arbeiddi Martha í Ullvøruhúsinum eina tíð. Men húsið heima var stórt, so eins og aðrar gentur mátti hon vera heima og hjálpa mammuni við húsarhaldinum.

Men í 1933 giftist hon við Sámal Erik Matras av Viðareiði. Hann var lærari og serstakliga varð hann kendur sum fimleikalærari.

Martha og Sámal Erik búsettust í Havn, og í 1949 fluttu tey í egin hús í Dj. í Geilsgøtu. Men longu fáar mánaðar eftir, at tey vóru flutt, fyrst í 1950, fekk Sámal Erik heilabløðing og lammaðist. Hetta broytti umstøðurnar hjá Marthu, sum nú mátti nýta alla sína orku at passa mannin. Martha sigur, at hetta var ein tung tíð. Tað var eingin hjálp fyri sjúkuni, og almenni stuðulin til røktina var tá sera avmarkaður. Men tað sum lætti nógv um her var tað serstaka samanhald, sum var í familjuni, og sum onnur tóku til. Familjan kendi tað sum sína ábyrgd at vitja og at hjálpa til har tað kundi hjálpast. Støðan hjá Sámal Erik versnaði so líðandi, og hann doyði í 1960.

### Positiv og lívsjáttandi

Tey bæði fingu tvær døtur Bjørg, f. 1935 og Jórun f. 1938. Bjørg var gift við Hera Jensen, sum starvaðist á Matrikulstovuni, og sum doyði í 1995, og sjálv doyði Bjørg í 2000. Jórun er gift við Petur Ellefsen. Martha eigur sjey ommubørn og heilt fitt av langommubørnum.

Hjá tí sum skrivar hesar reglur hevur tað verið stuttligt at koma at kenna Marthu. Hon er altíð so positiv og lívsjáttandi at práta við. Sum sagt býr hon á ellisheiminum, og hon er so takksom fyri tær umstøður, sum eru her. Tey sum arbeiða eru so fitt, og tað sama er við búfólkunum. Og hóast ta mótgongd hon hevur havt, so hevur hon nógv at takka Gudi fyri. Millum annað fyri, at hon kortini fekk 16 góð ár í sínum hjúnalagi, áðrenn maðurin gjørdist sjúkur. Og hon hevur annars havt mong góð ár.

Og tað er altíð hugaligt at kenna eitt slíkt fróðarfólk, sum minnist so væl til. Hon er ein sera vitandi kvinna og hevur áhuga í øllum sum rørist í samfelagnum.

Vit ynskja Marthu hjartaliga tillukku við tí stóra degnum í dag!

**ó.**

---

Støð - Støður:

# Ingi Joensen sýnir fram í Listaskálanum

**FRAMSÝNING**

Fríggjadagin 19. oktobur 2007, kl. 16.00 verður fernisering í Listaskálanum í sambandi við, at Listasavn Føroya skipar fyri framsýningini *Støð - Støður* við Inga Joensen listafotografi. Á framsýningini verða 42 ljósmyndir og 3 myndrøðir at síggja. Harumframt er ein bók gjørd, ið Gunnar Hoydal rithøvundur og arkitektur hevur skrivað. Bókin er 56 síður við teksti á føroyskum, enskum og donskum og við 37 myndum. Bókin kostar kr. 200, men til ferniseringina verður hon at fáa fyri kr. 150. Ingi Joensen verður hjástaddur á ferniseringini.

Ingi Joensen er føddur í Havn í 1953. Í 1977 nam hann sær útbúgving á deildini fyri tekning og grafikk á Danmarks Designskole í Keypmannahavn eftir fýra ára skúlagongd. Hann hevur verið á námsferð í londum sum Spania, Italia, Fraklandi, Íslandi, Grønlandi og USA. Hann hevur luttikið á mongum framsýningum í Føroyum og Danmark



umframt í Fraklandi, Italia, Íslandi og Grønlandi. Síðan 1980 hevur Ingi Joensen rikið egna fyritøku, sum sniðgevur bøkur, heimasíður, pakkitilfar og aðrar prentlutir, og ger sjónvarpslýsingar og multimedia tilfar. Hann hevur gjørt myndil av havbotninum kring Føroyar, stuttfilmin *Taxi* og barnabókina *Trøllið hjá pápaleysa*. Eisini hevur hann gjørt prýðingar í Hotel Føroyum, Føroya Handilsskúla og Strandferðslupakkhúsin um. Í 1992 kom út bókin *Reflektión*, ið snýr seg um listina hjá Inga Joensen. Við í bókini eru einar hálvthundrað viðgjørdar myndir.

Í nýggju bókini, *Støð – Støður*, sigur Gunnar Hoydal m.a.:

*Í fyrstani ta strongu svørt-hvítu leiðina, har myndin er ein listarlig skipan av linjum og flatum í ljósi og myrkri. Hjá honum er seinni tað gátuføra komið aftrat, lutir og landsløg hava fingið litir, tøgn valdar, men aftan fyri tøgnina eru tekin, sum gera vart við seg og fáa mál fyri seg. Eitt øðrvísi mál, sum bara eygað og sinnalagið varnast. Tað sjónliga goymir í sær ein ósjónligan heim, sum hevur aðrar týdningar enn teir vanligu, og listamaðurin kann sum sansandi vera, samantvunnin við henda orðleysa heimin, lokka fram týdningar á markinum millum tøgn og mynd.*

*Myndirnar standa navnleysar og orðleysar. Ein hjallur við sjóvarmálan, eitt gróthús í haganum, hús mest sum frágingin í kava ella skýming, okkurt kortini við ljósi í onkrum vindeyga til at standa ímóti illveðrinum, ið tekur seg upp. Nógv einsemi er í myndunum, eisini teimum, har fólk síggjast ganga ella standa, sum hava tey einki at siga hvørt við annað. Einsemið á kirkjugarðinum, har grøs og blómur royna at vinna á gravsteinunum. Myndir eisini innandura við leivdum av onkrum, sum einaferð hevur verið, hurðar tiknar av leikindum, farvegir og slóðir í lutum, sum bíða eftir, at myndin verður tikin. Sjálvt í royndunum við ljósi og skugga eftir naknum kroppi tykist tíðin at vera steðgað. Her eru støðini, sum samstundis gerast støður í huganum á tí, sum sær myndirnar. Tær eru sum grafiskar tekningar, ofta hækkaðar við litum, soleiðis sum teir gomlu meistararnir kundu hækka onkran part av tekningini til at gera vart við eitthvørt serstakt og fáa javnvág í heildina.*

**Framsýningin er opin:**
**19. oktobur – 16. desember 2007.**

**Listasavn Føroya er opið:**

Týsdag – sunnudag, kl. 14.00 – 16.00.

Mánadag er stongt.

---

## Andlát og jarðarferðir

**Ingrid Joensen** úr Miðvági, andaðist týsdagin, 58 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Amalia Østerø** úr Skálafirði vanliga nevnd Malla, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 85 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin klokkan 17 í Skála Kirkju. Jarðarferðin verður sunnudagin klokkan 14.

Tey, ið vilja minnast Mallu kunnu lata eina peningagávu til Eldrasambýlið á Skála. Konta í peningastovni